# Tvey góð ár



**Hóast øll málini, sum Henrik Larsen setti sær við setanina, ikki eru rokkin, so má niðurstøðan eftir tey bæði fyrstu árini vera, at stór fet eru tikin á leiðini**

> Tað var ikki altíð fyri tað góða, at fokus varð sett á Stóra fyrstu tíðina sum landsliðsvenjari, men so skjótt sum dystirnir fóru ígongd, var hetta broytt

SAMANUM
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Vit skulu hava sjey stig.

Vit skulu skifta leikskipan til eina fýra-mans verju, so vit koma longur fram á vøllin.

Føðibrøvini vísa, at ein ávís útskifting er neyðug í hópinum, og hesa mugu vit gjøgnumføra.

Og so mugu vit eisini hava Toda Jónsson aftur á landsliðið.

Jú, Stóri Larsen hevði stór orð at bera fram, tá hann í mai mánaði í fjør skrivaði undir sáttmála við Fótbóltssambandið. Ein sáttmáli, sum í fyrstu atløgu skuldi vara tvey ár.

## Hørð byrjan

Tá venjarin samstundis ásannaði, at hann hevði ein ógvuliga avmarkaðan kunnleika til føroyskan fótbólt, var greitt, at hetta ikki fall í eins góða jørð alla staðni. Nakað sum eisini merkti skrivingina her í blaðnum, og tað ikki minst eftir at tað stóð greitt, at venjarin ikki fekk stundir at koma til Føroyar undan summarsteðginum, hóast fyrstu útmeldingarnar greitt bendu á, at venjarin hevði møguleika at koma til landið áðrenn summarsteðgin, um so var, at hann undan hesum hevði tryggjað táverandi felagnum, Ølstykke, uppflyting til næstbestu donsku deildina.

Skrivingin ta ferðina fekk enntá føroyska fótbóltsbossin, Dánjal Andreasen, at taka til orðanna.

- Latið mannin sleppa ígongd, áðrenn tit døma hann, vóru boðini frá Dánjal á hesum síðum tann 12. juli.

- At fílast inn á Fótbóltssambandið er í lagi, men betri skuldi verið tikið ímóti manninum, tí hann hevur einki gjørt enn, voru boðini. Og tað var einamest hetta seinasta, sum bitið varð merki í, tí maðurin hevði jú einki gjørt.

## Kritikkurin tagnaði

At skula bíta seg sjálvan í vørrina, er kanska ikki so léttur kostur, men í hesum førinum má ásannast, at Dánjal Andreasen hevði rætt í sínum atfinningum. Tí tað gekk ikki long tíð, áðrenn Henrik hevði víst, at hann í øllum førum hevði nakað at hava stóru orðini í.

Longu undan fyrsta dystinum, sum var móti Liktenstein tann 20. august, stóð greitt, at í øllum førum tríggir stuðulsleikarar ikki fóru at vera við. Uni Arge hevði álvarsligar trupulleikar við rygginum, og mátti seta skógvarnar á hillina, Øssur Hansen metti seg ikki longur hava stundir til landsliðið, og Todi Jónsson hevði framvegis ikki flaggað inn í føroyska havn aftur. At hetta so eisini hjálpti til í ætlanunum at skifta føðibrøvini er so nakað heilt annað.

Men fyrsti dysturin móti Liktenstein varð vunnin, og samstundis fekk føroyska liðið brotið forbannilsið, sum annars tóktist liggja á Tórsvølli. Gaman í var hetta bert ein pinkutjóð, men longu næsta dystin, fekk tjóðin orsøk at fegnast.

Tann 6. september var stórur partur av fótbóltseuropa – og í øllum førum Skotland – skelkað. John Petersen syrgdi tíðliga í dystinum fyri, at Føroyar vóru á odda 2-0 móti Skotlandi. Ein leiðsla, sum bert av svartasta óhepni fall burtur, soleiðis at talan gjørdist um javnleik, men hóast hann iðraði seg, so hevði Larsen orsøk at smílast. Kritikkurin tagnaði, venjarin fekk arbeiðsfrið, og kanska einamest, so hevði hann víst, at hóast avboðini, so høvdu føroyingar framvegis eitt landslið, sum nógv kundi byggjast á.

## Nógv er rokkið

Og fyri at venda aftur til málini, so er nógv rokkið á leiðini.

Teimum sjey stigunum rukku vit ikki, og tað var kanska eisini utopiskt at ímynda sær hesi, tá lutakastið ikki longur setti Føroyar í bólk við onkra pinkutjóð. At vit so í nógvum førum hava verið heilt nær við, er ein onnur søga, og tað bendir kanska á, at tað eisini í komandi undankapping eru fleiri stig í eygsjón.

Leikskipanin varð alt fyri eitt broytt til eina fýra mans ketu í verjuni, og fyri tað allar mesta hevur hendan rigga sera væl. Ikki minst, tá hugsað verður um, hvussu lítil tíðin er, sum landsliðsvenjarin hevur at arbeiða við fólkinum, sammett við venjaran í einum vanligum felag, sum at kalla hvønn dag kann greiða leikarunum frá ætlanum sínum. Hetta bendir á sera góð evni at samskifta við fólk, og at venjarin eisini gevur Jógvan Martin Olsen stóran part av æruni í so máta, undirstrikar eisini, at hann er ein liðspælari. At tað so hjálpti til í umskiftinum, at Jón Rói Jacobsen alt fyri eitt varð gjørdur til verjuálit, er nakað annað, men tað er so eisini uppgávan hjá venjaranum at duga at síggja, hvussu besta liðið verður sett saman.

At dópsbrøvini skuldu skifast út, gjørdist sum omanfyri nevnt at kalla neyðugt, tá eitt nú Øssur og Uni ikki longur sóu seg førar fyri at vera við. Øssur kom so kortini við tveir dystir, tá hann hevði møguleikan at spæla móti Týsklandi, og hóast hetta kann fatast sum misálit á teir, sum annars kappaðust um sessin, so var tað á ongan hátt nakað, sum gjørdi liðið veikari.

Og at handling var aftan fyri orðini, er eisini prógvað. Fleiri nýggj andlit eru komin í landsliðshópin, og tó at ikki allir steðgirnir hava verið eins drúgvir, so eru tó fleiri teirra, sum hava bitið seg fastar. Eingin fastari enn Jann Ingi Petersen, men verður hugt at hópinum móti Litava mikukvøldið, so vóru eisini fleiri aðrir. Atli Danielsen, Tór-Ingar Akselsen og Christian Lamhauge Holst eru allir púra feskir, og eisini er talan um fleiri aðrar leikarar, sum veruliga hava sligið ígjøgnum undir nýggja venjaranum.

Í hesum sambandi er eisini vert at nevna, at saman við hjálparvenjaranum hevur Henrik Larsen sýnt stórt dirvi, tá landsliðið er sett til ymsu dystirnar. Tað hevur verið sjáldan, at liðið bara sett eftir gomlum vana, so sum tað kanska onkra aðra tíð hevur verið gjørt, men tvørtur ímóti tykjast fleiri pláss at vera sett eftir, hvussu venjarin metir dagsformin hjá leikarunum at hava verið. Tað er sjálvandi ikki follið eins heppið út hvørja ferð, men tað brýtir í øllum førum við vanahugsan, og so bendir tað eisini á, at her er ein maður, sum torir at standa inni fyri sínum hugsanum.

Útsøgnin um Toda var soleiðis tann einasta, sum als einki høpi var í, men tað undirstrikar helst bara, at tað als einki persónligt agg var handan avboðið hjá Toda í sínari tíð, men at skaðafrekvensurin var einasta grundgevingin. Ein grundgeving, sum hann eisini framvegis heldur fast í.

Men samanumtikið, so er eftirmetingin nakað væl betri, enn skoðsmálið, sum hann fekk í juli mánaði í fjør. Fyri fyrst takka vit fyri tey bæði fyrstu árini, men ein nýggj undankapping stendur fyri framman, og eisini hon verður við Henrik og Jógvan Martin við stýrisvølin.

Og tað gleða vit okkum til!



# Jens Martin setti nýtt met

**Sannlíkið fyri at málverjin skal missa sessin sum aldursforseti tey fyrstu árini tykist vera rættuliga lítið**

ELSTI SPÆLARIN
*Jóannes Hansen*



*Eisini tey bæði komandi árini kann roknast við, at Jens Martin Knudsen verður aldursforseti á føroyska landsliðnum. Ein leiklutur, sum tó á ongan hátt tykist nerva málverjanum*

Óli Johannesen var ikki í átjan manna hópinum mikukvøldið. Skaðin, sum týsdagin helt honum burtur frá venjingini, vísti seg so mikið álvarssamur, at tað var ikki hugsningur um at spæla. Harvið hevur Óli framvegis spælt 63 landsdystir.

Jens Martin Knudsen er næstur í røðini. Mikukvøldið tók hann seg eitt fet nærri Óla. Nú hevur Jens Martin spælt 59 altjóða skrásettar landsdystir.

Eysturríkski UEFA umboðsmaðurin, Wolfgang Thierrichter, sum í góðveðrinum eftir dystarenda stóð og tók myndir yvir Skálafjørðin og vestur ímóti Raktanga, undraðist og spurdi, um tað ikki var sami málverji, sum vardi málið í minniliga dystinum ímóti landsmonnum hansara í Landskrona í dag fyri júst trettan árum síðani.

*Minnist tú Jens Martin og 1–0 tapið?*

– Tað kanst tú ætla. Tað gera øll í Eysturríki og sjálvandi eisini so mangar aðra staðni.

Jens Martin Knudsen er føddur 11. juni í 1967. Hann er sostatt 36 ár og eitt fjórðingsár gamal. Næstelsti maðurin á føroyska liðnum mikukvøldið var Jákup Mikkelsen, sum er trý ár og tveir mánaðir yngri enn Jens Martin.

Sjálvandi mundi tað kennast sum vónbrot hjá Jákupi, sum síðani eftir fyrsta dystin í hesi undankappingini ímóti Skotlandi, hevur vart málið í øllum undankappingardystunum, at hann ikki fekk møguleikan hesa ferð.

Venjararnir sigast ikki hava verið heilt nøgdir við avrikini hjá honum tvær tær seinastu ferðirnar, og teir hava undir venjing hildið seg kunnað staðfest, at Jens Martin hevur verið so mikið væl fyri, at teir ikki hava himprast við at geva honum ein nýggjan møguleika. Tað er ikki fyrsta ferðin, at Jens Martin fær møguleikan, eftir at Jákup í nógvum undankappingardystum á rað hevur vart málið. Umframt fyrsta dystin í fjør, so er eitt annað dømi um hetta undankappingin til EM í 2000. Ta ferðina var síðsti undankappingardysturin í Prag, og tá var tað óvæntað, at Allan Simonsen valdi Jens Martin framum Jákup, ið hevði verið málverji í nógvum teimum seinastu dystunum.

At Jens Martin kom úr skugganum á beinkinum og gjørdist liðformaður er sjálvandi hugaligt hjá honum. Fleiri mundu hugsa, at hetta var gott høvi at takka vetaranmálverjanum fyri langa og trúgva tænastu, nú Jens Martin kanska hevði ætlað at leggja frá sær. Aðra staðni á hesum síðum sigur Jens Martin sjálvur, at hann avgjørt ikki gongur í sovornum hugsanum.

## Broytingar og skuggin

Sammett við undanfarnu dystirnar í hesi undankappingini var liðið hesa ferð ógvuliga nógv broytt. Avgerðirnar hjá venjaranum vísa eisini, at hann ikki tykist vera eins trúgvur ímóti teimum fyrstu ellivu, sum eitt nú Allan Simonsen var tað. Hetta kann eisini skiljast soleiðis, at tað nú eru fleiri kvalifiseraðir spælarar at velja ímillum, enn tað vóru fyri bara heilt fáum árum síðani.

Hjalgrím Elttør, sum fyri einum ári síðani var um reppið at javna ímóti Oliver Kahn og Týsklandi, var als ikki við í hesum umfarinum. Andrew av Fløtum, sum kanska var fyrsti álopsmaðurin fyri einum fjóðringsári síðani, sat á beinkinum allar 90 minuttirnar, og Rógvi Jacobsen, sum fyrr í summar tóktist vera loysnin í holinum í vinstru, sum hevur verið síðani Øssur Hansen gavst, varð ikki afturvaldur eftir ikki heilt sannførandi avrikið í Skotlandi. Helgi L. Petersen fekk í Glasgow leygardagin fyri fyrstu ferð rættuligan møguleika, men mikudagin var gamli liðfelagin hjá Helga, Christian Høgni Jacobsen, sum var leikbannaður ímóti Skotlandi, aftur fremsti maður. Harvið kann ikki annað enn staðfestast, at venjarin ikki hevur hildið, at Helgi rættuliga tók av.

Nógv varð undan hesum umfarinum gjørt burturúr, at Christian Lamhauge Holst varð úttikin. Hann spældi lítla løtu í Skotlandi, og mikukvøldið sat hann á beinkinum allar 90 minuttirnar. Harvið ber til at staðfesta, at hann í løtuni ikki verður mettur sum upplagt boð upp á fremsta álopssessin.

Atli Danielsen kom á vøllin síðstu løtuna mikukvøldið. Sambært venjaranum er hann avgjørt ein maður, sum hann roknar við, og Atli vísti ta lítlu løtuna, sum honum lutaðist, at tað er dugur í honum.

## Úrslit úr EM-undankappingini

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Ísrael-Malta | 2-2 (1-0) | Luksemburg-Bosnia Hersegovina | 0-1 (0-1) | Slovenia-Frakland | 0-2 (0-1) |
| Andorra-Bulgaria | 0-3 (0-2) | Belgia-Kroatia | 2-1 (1-1) | Wales-Finnland | 1-1 (1-0) |
| Moldova-Hvítarussland | 2-1 (1-0) | Kekkia-Holland | 3-1 (2-0) | Ongland-Liktenstein | 2-0 (0-0) |
| Russland-Sveis | 4-1 (2-1) | Póland-Svøríki | 0-2 (0-2) | Norðurírland-Armenia | 0-1 (0-1) |
| Danmark-Rumeina | 2-2 (1-0) | Slovakia-Makedonia | 1-1 (1-0) | Spania-Ukraina | 2-1 (0-0) |
| Føroyar-Litava | 1-3 (1-1) | Týskland-Skotland | 2-1 (1-0) | | |
| Albania-Georgia | 3-1 (0-0) | Serbia&Montenegr-Italia | 1-1 (0-1) | | |
| Letland-Ungarn | 3-1 (2-0) | | | | |

## Bólkur 1

| | d | v | j | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Frakland | 7 | 7 | 0 | 0 | 26 | 2 | 24 | 21 |
| 2 Slovenia | 7 | 4 | 1 | 2 | 13 | 10 | 3 | 13 |
| 3 Ísrael | 7 | 2 | 3 | 2 | 9 | 8 | 1 | 9 |
| 4 Kypros | 7 | 2 | 1 | 4 | 7 | 16 | -9 | 7 |
| 5 Malta | 8 | 0 | 1 | 7 | 5 | 24 | -19 | 1 |

Bólkur 2

| | d | v | j | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Rumenia | 8 | 4 | 2 | 2 | 21 | 9 | 12 | 14 |
| 2 Danmark | 7 | 4 | 2 | 1 | 14 | 8 | 6 | 14 |
| 3 Bosnia -Hersegovina | 7 | 4 | 0 | 3 | 6 | 7 | -1 | 12 |
| 4 Noreg | 7 | 3 | 2 | 2 | 8 | 5 | 3 | 11 |
| 5 Luksemburg | 7 | 0 | 0 | 7 | 0 | 20 | -20 | 0 |

Bólkur 3

| | d | v | j | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Kekkia | 7 | 6 | 1 | 0 | 20 | 3 | 17 | 19 |
| 2 Holland | 7 | 5 | 1 | 1 | 15 | 6 | 9 | 16 |
| 3 Eysturríki | 7 | 3 | 0 | 4 | 10 | 11 | -1 | 9 |
| 4 Moldova | 7 | 2 | 0 | 5 | 5 | 14 | -9 | 6 |
| 5 Hvítarussland | 8 | 1 | 0 | 7 | 4 | 20 | -16 | 3 |

Bólkur 4

| | d | v | j | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Svøríki | 7 | 5 | 2 | 0 | 19 | 2 | 17 | 17 |
| 2 Letland | 7 | 4 | 1 | 2 | 9 | 6 | 3 | 13 |
| 3 Ungarn | 7 | 3 | 2 | 2 | 14 | 7 | 7 | 11 |
| 4 Póland | 7 | 3 | 1 | 3 | 9 | 6 | 3 | 10 |
| 5 San Marino | 8 | 0 | 0 | 8 | 0 | 30 | -30 | 0 |

Bólkur 5

| | d | v | j | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Týskland | 7 | 4 | 3 | 0 | 10 | 4 | 6 | 15 |
| 2 Ísland | 7 | 4 | 1 | 2 | 11 | 6 | 5 | 13 |
| 3 Skotland | 7 | 3 | 2 | 2 | 11 | 8 | 3 | 11 |
| 4 Litava | 7 | 3 | 1 | 3 | 7 | 10 | -3 | 10 |
| 5 Føroyar | 8 | 0 | 1 | 7 | 7 | 18 | -11 | 1 |

Bólkur 6

| | d | v | j | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Grikkaland | 7 | 5 | 0 | 2 | 7 | 4 | 3 | 15 |
| 2 Spania | 7 | 4 | 2 | 1 | 12 | 4 | 8 | 14 |
| 3 Ukraina | 8 | 2 | 4 | 2 | 11 | 10 | 1 | 10 |
| 4 Armenia | 7 | 2 | 1 | 4 | 7 | 12 | -5 | 7 |
| 5 Norður Írland | 7 | 0 | 3 | 4 | 0 | 7 | -7 | 3 |

Bólkur 7

| | d | v | j | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Ongland | 7 | 6 | 1 | 0 | 14 | 5 | 9 | 19 |
| 2 Turkaland | 7 | 6 | 0 | 1 | 17 | 5 | 12 | 18 |
| 3 Slovakia | 7 | 2 | 1 | 4 | 9 | 9 | 0 | 7 |
| 4 Makedonia | 8 | 1 | 3 | 4 | 11 | 14 | -3 | 6 |
| 5 Liktenstein | 7 | 0 | 1 | 6 | 2 | 20 | -18 | 1 |

Bólkur 8

| | d | v | j | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Bulgaria | 6 | 4 | 2 | 0 | 10 | 3 | 7 | 14 |
| 2 Kroatia | 6 | 4 | 1 | 1 | 10 | 2 | 8 | 13 |
| 3 Belgia | 6 | 3 | 1 | 2 | 7 | 8 | -1 | 10 |
| 4 Estland | 7 | 2 | 2 | 3 | 4 | 4 | 0 | 8 |
| 5 Andorra | 7 | 0 | 0 | 7 | 1 | 15 | -14 | 0 |

Bólkur 9

| | d | v | j | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Italia | 7 | 4 | 2 | 1 | 13 | 4 | 9 | 14 |
| 2 Wales | 7 | 4 | 1 | 2 | 11 | 7 | 4 | 13 |
| 3 Finnland | 8 | 3 | 1 | 4 | 9 | 10 | -1 | 10 |
| 4 Serbia & Montenegro | 7 | 2 | 3 | 2 | 8 | 9 | -1 | 9 |
| 5 Aserbadjan | 7 | 1 | 1 | 5 | 5 | 16 | -11 | 4 |

Bólkur 10

| | d | v | j | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Sveis | 7 | 3 | 3 | 1 | 12 | 7 | 5 | 12 |
| 2 Russland | 7 | 3 | 2 | 2 | 16 | 11 | 5 | 11 |
| 3 Írland | 7 | 3 | 2 | 2 | 10 | 9 | 1 | 11 |
| 4 Albania | 8 | 2 | 2 | 4 | 11 | 15 | -4 | 8 |
| 5 Georgia | 7 | 2 | 1 | 4 | 7 | 11 | -4 | 7 |